# VEGLEIÐING UM LØGTINGSLÓG UM VAKMYNDATÓL

**Januar 2021**

**1. útgáva**

POLITI

Dátueftirlitið

# Innihaldsyvirlit


1. Nýggj løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli ... 2
2. Allýsingar ... 3
   2.1. Yvirvøka ... 3
   2.2. Vakmyndatól ... 3
3. Nær er yvirvøka fevnd av løgtingslógini? ... 4
4. Nær kunnu privat yvirvaka við vakmyndatóli? ... 5
   4.1. Øki við vanligari ferðslu (alment øki) ... 5
      4.1.1. Øki við vinnuligum virksemi ... 6
      4.1.2. Peningasjálvtøkur og bilar, sum flyta pengar ... 6
      4.1.3. Peningastovnar o.tíl., gistingarhús, matstovur, handilsmiðstøðir og handlar ... 6
      4.1.4. Tunlar ... 7
      4.1.5. Yvirvøka, sum ikki verður bandað ... 7
      4.1.6. Serlig loyvisskipan ... 8
   4.2. Øki, sum vanlig atgongd er til ... 8
   4.3. Privat øki ... 9
5. Nær kunnu almennir myndugleikar yvirvaka við vakmyndatóli? ... 9
6. Skelting ... 10
7. Serligt um yvirvaking á arbeiðsplássum ... 13
8. Víðarigeving og striking ... 15
9. Dátuábyrgdari og dátuviðgeri ... 17
   9.1. Viðgerðartrygd ... 17
   9.2. Heimild og meginreglur fyri viðgerð av persónupplýsingum ... 18
10. Fráboðan til Dátueftirlitið ... 19
11. Fráboðan til politiið ... 20

# 1. Nýggj løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli

1. januar 2021 kom ein nýggj løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli í gildi. Endamálið við nýggju løgtingslógini er at tryggja eina dagførda og tíðarhóskandi løgtingslóg um at yvirvaka við vakmyndatóli, sum tekur atlit til rættin hjá persónum ikki at vera fyri óneyðugari og inntrívandi privatari yvirvøku í almenna rúminum. Samstundis verða neyðug atlit tikin til, at tað í ávísum førum kann verða neyðugt at yvirvaka, m.a. fyri at økja um tryggleikan og fyri at fyribyrgja lógarbrotum.

Lógin um yvirvøku við vakmyndatóli stendur ikki einsamøll, men regulerar saman við dátuverndarlógini yvirvøkuøkið. Sostatt er umráðandi, tá ið støða skal takast til, um vakmyndatól skal setast upp, at geva sær far um, at løgtingslógin um yvirvøku við vakmyndatóli er partur av eini størri heild.

Tann, sum ætlar at seta upp vakmyndatól, skal m.a. boða Dátueftirlitinum frá og týðiliga kunna vísa á, at yvirvøka fer fram (skelta). Harumframt skal yvirvøkan vera í samsvar við dátuverndarlógina, og m.a. fylgja meginreglunum um viðgerð av persónupplýsingum.

# 2. Allýsingar

## 2.1. Yvirvøka

Yvirvøka við vakmyndatóli er at skilja sum skipað ella regluliga endurtakandi yvirvøka av persónum við fjarstýrdum ella sjálvvirkandi vakmyndatóli, myndatóli ella líknandi. Tað er uttan týdning, um myndaupptøka fer fram, ella um myndirnar bert verða vístar á einum skermi ella líknandi.

Løgtingslógin um yvirvøku við vakmyndatóli fevnir einans um yvirvøku av persónum. Um endamálið við yvirvøkuni ikki er at yvirvaka persónar, er løgtingslógin ikki galdandi. Tað merkir, at yvirvøka, sum bert er rættað móti øðrum enn persónum, sum t.d. maskinum, bygningum ella djórum, ikki er umfatað av lógini.

## 2.2. Vakmyndatól

Vakmyndatól eru tól, sum skipað ella regluliga endurtakandi kunnu yvirvaka persónar. Talan er um vakmyndatól, sum er fjarstýrt ella sjálvvirkandi.

Orðingin er breið og fevnir í útgangsstøðinum um øll tól, sum kunnu yvirvaka á nevnda hátt, undir hesum eisini vevmyndatól.

Nýggj tøkni hevur við sær, at vakmyndatól ofta hava aðrar innbygdar møguleikar enn at taka upp. Sostatt er møguligt, at vakmyndatól hava funktiónir, sum eru tengdar at t.d. eftirgjørdum viti (dk: kunstig intelligens, en: artificial intelligence) ella andlitsafturkenning.

Løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli setur ikki alment forboð fyri slíkum funktiónum. Tó er umráðandi at vera varugur við aðra lóggávu, undir hesum serliga dátuverndarlógina, um ein ætlar at nýta slíkar funktiónir í sambandi við yvirvøku.

# 3. Nær er yvirvøka fevnd av løgtingslógini?

Tað eru tríggjar treytir fyri at talan er um yvirvøku, sum er fevnd av løgtingslógini um yvirvøku við vakmyndatóli.

Fyri tað fyrsta skal talan vera um yvirvøku, sum er rættað ímóti persónum. Tað merkir, at orsøkin til at yvirvaka er at hava eftirlit við persónum og teirra atferð. Tað hevur við sær, at løgtingslógin ikki bara fevnir um yvirvøku, sum hevur til endamáls at fyribyrgja lógarbrotum, men eisini yvirvøku, sum hevur annað endamál, t.d. trygd ella sosialt kontrol.

Treytin um, at yvirvøkan skal verða rættað ímóti persónum, hevur við sær, at yvirvøka, sum er rættað ímóti tólum, bygningum ella djórum ikki er fevnd av lógini.

Fyri tað næsta skal talan vera um eitt tól – vakmyndatól, myndatól ella líknandi – sum er fjarstýrt ella sjálvvirkandi. Hondhildin tól, sum eru stýrd á staðnum, eru tískil ikki fevnd. Hetta kann t.d. vera upptøkur, sum privatpersónur ger á síni telefon. Sjálvt um slíkar upptøkur ikki eru fevndar av løgtingslógini, kunnu tær, serliga í mun til víðarigeving, verða fevndar av aðrari lóggávu.

Fyri tað triðja skal yvirvøkan vera skipað ella regluliga endurtakandi. Hetta hevur við sær, at nýtsla í einstøkum førum ella tilvildarlig nýtsla av nevndu tólum ikki er fevnd av forboðnum.

Henda treytin merkir ikki, at upptøkurnar skulu vera áhaldandi. Vakmyndatól, sum taka upp sjálvvirkandi, hvørja ferð onkur gongur framvið, eru fevnd, tí hetta er bæði skipað og regluliga endurtakandi. Upptøka, sum fer í gongd, tá trýst verður á ein alarm-knøtt er hinvegin ikki fevnd, av tí, at slík upptøka ikki er skipað ella regluliga endurtakandi, men heldur ber brá av at vera tilvildarlig.

Ásetingarnar um yvirvøku við vakmyndatóli eru eisini galdandi, tá fevndu tólini verða sett upp. Hetta ger, at tað ikki er neyðugt, at vakmyndatólið er sett til og tekur upp, fyri at løgtingslógin verður brotin. Tað er sostatt nóg mikið, at vakmyndatólið verður sett upp.

# 4. Nær kunnu privat yvirvaka við vakmyndatóli?

Sum útgangsstøði er ikki loyvt privatum at yvirvaka gøtu, veg, pláss ella líknandi øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu (almenn øki). Hóast tað í útgangsstøðinum er bannað privatum at seta upp vakmyndatól, kunnu privat í summum førum yvirvaka við vakmyndatóli.

Privat er her at skilja sum bæði privatpersónar og privatir løgfrøðiligir persónar so sum privatar fyritøkur, feløg o.a.

Í skipanini við yvirvøku við vakmyndatóli, kann skiljast ímillum øki við vanligari ferðslu og øki, sum vanlig atgongd er til og privat øki.

## 4.1. Øki við vanligari ferðslu (alment øki)

Løgtingslógin um yvirvøku við vakmyndatóli setur forboð fyri, at privat yvirvaka við vakmyndatóli á øki við vanligari ferðslu. Orsøkin er m.a., at tað ikki er ein privat uppgáva at syrgja fyri tryggleika ella at fyribyrgja lógarbrotum á almennum økjum.

Forboðið fyri at yvirvaka øki við vanligari ferðslu, hevur sostatt við sær, at lógin bannar privatari yvirvøku við vakmyndatóli á almennum øki, t.e. øki, sum ein og hvør frítt hevur atgongd til og kann vera á, og har ein skal kunna vera uttan at vera fyri yvirvøku. Tað avgerandi er sostatt ikki, um gøtan o.s.fr. er almenn ella privat, men um hon verður nýtt til vanliga ferðslu.

Frá hesum útgangsstøðinum eru nøkur undantøk, av tí, at tað í serligum førum eru haldgóðar orsakir til, at privat í avmarkaðan mun yvirvaka hesi øki.

Í § 3 í løgtingslógini eru fimm undantøk frá forboðnum móti yvirvaking.

### 4.1.1. Øki við vinnuligum virksemi

Sambært § 3, nr. 1 kann yvirvøka fara fram, um talan er um yvirvøku av bensinstøðum, ídnaðarvirkjum, innilokaðum handilsmiðstøðum og líknandi økjum, har vinnuligt virksemi fer fram, um tann sum hevur ræði á økinum stendur fyri yvirvøkuni.

Tað er ein fortreyt, at tað er tann, sum hevur ræði á økinum, sum stendur fyri yvirvøkuni. Hetta kann vera eigarin, men kann eisini vera leigarin.

Tað eru einans nevndu økini, sum kunnu yvirvakast, t.e. at tað í útgangsstøðinum ikki er loyvt at yvirvaka á ein slíkan hátt, at upptøkur verða gjørdar av almennum øki, sum liggur upp at nevndu økjunum. Tað merkir, at § 3, nr. 1 ikki heimilar, at yvirvøkutól á t.d. eini bensinstøð taka upp út á veg við vanligari ferðslu.

### 4.1.2. Peningasjálvtøkur og bilar, sum flyta pengar

Sambært § 3, nr. 2 kann yvirvøka fara fram, tá talan er um yvirvøku við peningasjálvtøkur o.tíl. ella bilar, sum einans verða nýttir til flutning av peningi, um tann sum hevur ræði á sjálvtøkuni ella bilinum, stendur fyri yvirvøkuni, og yvirvøkan einans er rættað móti persónum, sum eru beint við sjálvtøkuna ella bilin.

Ásetingin gevur møguleika fyri yvirvøku í tveimum førum, sum eru felags á tann hátt, at tey hava við reiðan pening at gera. Ásetingin er tí serliga – og kanska einans – viðkomandi fyri peningastovnar.

### 4.1.3. Peningastovnar o.tíl., gistingarhús, matstovur, handilsmiðstøðir og handlar

Sambært § 3, nr. 3 kann yvirvøka fara fram, tá talan er um yvirvøku, sum peningastovnar o.tíl., gistingarhús, matstovur, handilsmiðstøðir og handlar, har sum smásøla fer fram, hava av:

a. egnum inngongdum, framsíðu og baksíðu, og

b. økjum, sum eru beinleiðis knýtt at egnum inngongdum, framsíðu ella baksíðu, og sum natúrliga verða nýtt ella kunnu nýtast sum atgongd ella rýmingarleið, um yvirvøkan greitt er neyðug til tess at fyribyrgja lógarbrotum.

§ 3, nr. 3 heimilar, at nevndu støð kunnu yvirvaka egnar inngongdir, framsíðu og baksíðu, og harumframt kunnu yvirvaka á økjum, sum eru beinleiðis knýtt at egnum inngongdum, framsíðu ella baksíðu, og sum natúrliga verða nýtt ella kunnu nýtast sum atgongd ella rýmingarleið, um yvirvøkan greitt er neyðug til tess at fyribyrgja lógarbrotum.

Uppreksanin av fyritøkum, sum kunnu yvirvaka sbrt. § 3, nr. 3 er úttømandi.

Um fyritøkan skal yvirvaka meira enn egnar inngongdir, framsíðu og baksíðu (sbrt. nr. 3, litra a) er tað sbrt. nr. 3, litra b treytað av, at yvirvakaða økið natúrliga verður nýtt ella kann nýtast sum atgongd ella rýmingarleið, og at yvirvøkan greitt er neyðug til tess at fyribyrgja lógarbrotum. Virkisøkið fyri § 3, nr. 3, litra b er snævurt.

### 4.1.4. Tunlar

Sambært § 3, nr. 4 kann yvirvøka fara fram, tá talan er um yvirvøku í tunlum, undir hesum á gjaldsstøðum við tunnilsmunnar og á innkoyringarvegum, til tess at økja um trygdina ella til tess at krevja gjald um tann, sum hevur ábyrgdina av trygdini ella gjaldsskipanini stendur fyri yvirvøkuni.

Orsøkin til hesa áseting er, at tað í ávísum tunlum, serliga undirsjóvartunlum og øðrum longum tunlum, er neyðugt av trygdarorsøkum at hava yvirvøku. Ásetingin heimilar eisini yvirvøku í sambandi við gjaldsskipanina.

### 4.1.5. Yvirvøka, sum ikki verður bandað

Sambært § 3, nr. 5 kunnu privat yvirvaka við vakmyndatóli, um yvirvøkan ikki verður tikin upp á video, film o.tíl., tá talan er um yvirvøku av egnum inngongdum, framsíðu, baksíðu, girðing ella líknandi.

Ásetingin er ikki avmarkað til serligar fyritøkur, og økið, sum kann yvirvakast, fevnir eisini víðari enn í hinum ásetingunum. Treytin fyri at nýta hetta undantakið er, at upptøkan ikki verður bandað.

### 4.1.6. Serlig loyvisskipan

Umframt undantøkini í § 3 er ein serlig loyvisskipan í § 4. Hendan loyvisskipan hevur við sær, at politiið í samráð við landsstýrismannin í serligum førum eftir umsókn kann geva privatum loyvi til at yvirvaka, um hetta verður mett neyðugt til tess at fyribyrgja lógarbrotum.

Henda serliga loyvisskipanin skal sostatt tryggja, at tað í undantaksførum, tá tað verður mett politifakliga neyðugt við yvirvøku við vakmyndatóli, kann verða givið privatum undantak frá forboðnum, hóast hetta ikki er ásett í § 3.

Í útgangsstøðinum verður loyvi ikki givið privatpersónum til egna ogn.

Politiið kann seta treytir í loyvið. Tað kann t.d. vera um, hvar tólini skulu vera, og nær tey kunnu taka upp. Loyvið kann ikki hava longri gildistíð enn 2 ár.

Vanligu reglurnar í dátuverndarlógini um viðgerð av persónupplýsingum, undir hesum um viðgerðartrygd o.s.fr. eru altíð galdandi.

Umsókn um loyvi sambært § 4 skal sendast til politiið.

## 4.2. Øki, sum vanlig atgongd er til

Løgtingslógin um yvirvøku við vakmyndatóli bannar ikki yvirvøku á økjum, sum vanlig atgongd er til. Hetta er t.d. inni í handlum, peningastovnum, móttøkuhølum, og í taxabilum, bussum ella umborð á skipum.

Privat kunnu sostatt yvirvaka á hesum økjum, um hetta er innanfyri reglurnar í t.d. dátuverndarlógini og revsilógini.

At dátuverndarlógin er galdandi hevur m.a. við sær, at tað altíð skal vera ein saklig orsøk til yvirvøkuna, og at yvirvøkan, sum kann vera eitt inntriv í persónliga frælsið hjá tí einstaka, altíð skal lúka lutfalsmeginregluna. Umframt at lúka alment galdandi meginreglurnar fyri viðgerð av persónupplýsingum, skal ábyrgdarin eisini hava eitt viðgerðargrundarlag umframt at lúka treytirnar um trygd í sambandi við viðgerð.

### 4.3. Privat øki

Løgtingslógin um yvirvøku við vakmyndatóli bannar ella avmarkar ikki yvirvøku á privatum øki, t.d. í egnum húsi ella inni á egnum matrikuli. Um yvirvøka av privatum øki fer fram, skal tó ansast eftir, at vakmyndatólið ikki yvirvakar partar av almennum øki.

Yvirvøka av privatum øki kann í fleiri førum fara fram, tó skal ein vera serliga varugur við dátuverndarlógina og revsilógina, sum kunnu hava við sær avmarkingar.

# 5. Nær kunnu almennir myndugleikar yvirvaka við vakmyndatóli?

Almennir myndugleikar eru ikki fevndir av forboðnum fyri yvirvøku av øki við vanligari ferðslu í løgtingslógini um yvirvøku við vakmyndatóli.

Um almennir myndugleikar kunnu yvirvaka almenn øki, skal metast eftir øðrum reglum, sum eru galdandi fyri almennar myndugleikar, undir hesum serliga dátuverndarlógini, sum setur eitt alment krav um sakligheit og proportionalitet, og almenna fyrisitingarrættinum, sum eisini ásetur, hvussu ein almennur myndugleiki kann virka.

Fevnir yvirvakingin um persónar, er heimildin hjá almennum myndugleikum at yvirvaka við vakmyndatóli oftast § 8, stk. 1, nr. 5 í dátuverndarlógini, sum ásetur, at persónupplýsingar

kunnu viðgerast, um viðgerðin er neyðug til tess at røkja uppgávur, sum liggja undir almennari myndugleikaútinnan.

Umframt at hava heimild fyri viðgerðini, skulu grundleggjandi meginreglurnar í § 7 í dátuverndarlógini verða fylgdar um lógligheit, rímiligheit og gjøgnumskygni, endamálsavmarking og goymsluavmarking.

Um yvirvøku á arbeiðsplássum, sí niðanfyri undir pkt. 7.

# 6. Skelting

Sambært § 7 í løgtingslógini skulu bæði privat og almennir myndugleikar skelta ella á annan líknandi hátt týðiliga gera vart við, um yvirvøka fer fram. Tann, sum yvirvakar, hevur sostatt eina almenna kunningarskyldu.

Ásetingin hevur við sær, at tað í sambandi við alla lógliga yvirvøku skal skeltast. Hetta fevnir bæði um yvirvøku, sum er fevnd av § 3, men eisini um yvirvøku av øðrum hølum og støðum, sum vanlig atgongd er til, sum t.d. handlar.

Kunningarskyldan tryggjar gjøgnumskygni og gevur tí einstaka møguleika at umganga støð, sum verða yvirvakað, ella í øllum førum at tillaga atferðina.

Støð og høli fevnd av stk. 1 skal skiljast í samsvari við § 2, stk. 1 í ordensbekendtgørelsen[1] og fevnir um – umframt tað, sum er fevnt av § 2 – t.d. handlar, móttøkuhøli, farstøðir, flutningsfør og stuttleikastøð, sum vanlig atgongd er til.

Kravið um skelting ella aðra kunning er ikki galdandi fyri yvirvøku av bilum, sum einans verða nýttir til flutning av peningi. Hetta er grundað á tað óhepna í at skelta við, at talan er um ein bil, sum koyrir við pengum.

---

[1] Bekendtgørelse nr. 2094 af 14. december 2020 for Færøerne om politiets sikring af den offentlige orden og beskyttelse af enkeltpersoners og den offentlige sikkerhed mv., samt politiets adgang til at iværksætte midlertidige foranstaltninger

Haraftrat er ásett, at ásetingin um skelting ikki er galdandi fyri yvirvøku, sum ikki verður tikin upp.




*Mynd: Lýsing av virkisøkinum.*

# 7. Serligt um yvirvaking á arbeiðsplássum

Ein arbeiðsgevari kann eftir eina ítøkiliga meting koma fram til, at tað er neyðugt at yvirvaka á arbeiðsplássinum. Hetta kann t.d. vera inni í einum handli fyri at fyribyrgja stuldri. Í hesum førum er tað sannlíkt, at starvsfólk koma uppá upptøkurnar.

Um starvsfólk koma uppá upptøkurnar, verða persónupplýsingar viðgjørdar. Um persónupplýsingar verða viðgjørdar, eru reglurnar í dátuverndarlógini galdandi. Tá talan er um yvirvaking við vakmyndatóli á arbeiðsplássum er oftast heimild fyri viðgerðini í § 8, stk. 1, nr. 5 (fyri almennar myndugleikar) og § 8, stk. 1, nr. 6 (fyri privatar arbeiðsgevarar). Í serligum førum kann heimild vera fyri viðgerðini í § 12, stk. 1, nr. 3 um starvsrættarligar skyldur og tilskilað rættindi.

"Arbeiðspláss" skal í hesum samanhangi skiljast breitt og fevnir um øll støð, har sum arbeiði verður gjørt fyri ein likamligan ella løgfrøðiligan persón. Harumframt eru øki, sum vanliga ikki verða nýtt, men har sum t.d. reingerðarfólk frá eini reingerðarfyritøku eru, er eisini fevnt av hugtakinum "arbeiðspláss".

Umframt at hava eina heimild fyri viðgerðini, er tað ein fortreyt, at arbeiðsgevarin fylgir grundleggjandi meginreglunum í § 7 í dátuverndarlógini. Hetta er m.a. meginreglurnar um lógligheit, rímiligheit og gjøgnumskygni, um endamálsavmarking og goymsluavmarking. Sostatt kann ein arbeiðsgevari bara yvirvaka við vakmyndatóli á arbeiðsplássinum, um ein saklig orsøk er til tað, og um yvirvøkan ikki fevnir um meira, enn neyðugt er.

Í § 7, stk. 1 í løgtingslógini um yvirvøku við vakmyndatóli er ásett, at tað skal skeltast ella á annan líknandi hátt týðiliga skal gerast vart við yvirvøku á arbeiðsplássum.

Hetta tryggjar m.a., at tað ikki er møguligt hjá einum arbeiðsgevara loyniliga at yvirvaka starvsfólk. Fevnd eru øll støð, har sum arbeiði verður gjørt fyri ein likamligan ella løgfrøðiligan persón.

Arbeiðsgevarin skal sostatt kunna starvsfólkini um, at yvirvøka fer fram, hvat endamálið við yvirvøkuni er, nær arbeiðsgevarin hyggur at upptøkunum, og nær upptøkur verða latnar politinum.

Harumframt skulu starvsfólkini kunnast um, hvussu leingi upptøkurnar verða goymdar.

Kunningin um yvirvøku við vakmyndatóli skal í útgangsstøðinum verða givin frammanundan. Nýggj starvsfólk skulu hava kunning um yvirvøku í sambandi við starvssetan, ella í seinasta lagi tá ið tey byrja at arbeiða á økjum, sum eru yvirvakað.

At hava eitt starvsfólk undir støðugum eftirliti, er neyvan í samsvar við grundleggjandi meginregluarnar í § 7, serliga í mun til kravið um sakligheit og proportionalitet.

Tá vakmyndatól verða sett upp á arbeiðsplássum, skal arbeiðsgevarin vera serliga varugur við, at tað kunnu vera reglur innanfyri tað arbeiðsrættarliga økið, sum kunnu hava við sær avmarkingar.

# 8. Víðarigeving og striking

§ 8 í løgtingslógini um yvirvøku við vakmyndatóli snýr seg um víðarigeving og striking.

§ 8 fevnir einans um yvirvøku, sum er gjørd við tí endamáli at fyribyrgja lógarbrotum. Um endamálið er eitt annað, sum t.d. eftirlit við eini maskinu, skal víðarigeving og striking metast eftir vanligu reglunum um viðgerð av persónupplýsingum í dátuverndarlógini.

Endamálið við ásetingini er m.a. at fyribyrgja almannakunngerð ella útbreiðslu á internetinum av upptøkum av lógarbrotum. Hetta er vanliga nakað, sum politiið skal taka sær av.

Við víðarigeving er at skilja, at ein annar enn tann, sum hevur ábyrgd av upptøkunum, fær atgongd til hesar. Tað kann t.d. vera við, at upptøkurnar verða givnar víðari gjøgnum internetið ella fysiskt. Fevnt er eisini, at "screenshot" ella líknandi verður tikið av upptøkuni, og at henda myndin verður givin víðari. Víðarigeving fevnir eisini um, at ein persónur fær høvi at hyggja at upptøkunum uttan at fáa tær útleveraðar.

Upptøkur, sum innihalda persónupplýsingar, kunnu gevast víðari í trimum førum.

Fyri tað fyrsta kunnu upptøkurnar gevast víðari, um tann, sum er á upptøkunum (tann skrásetti), hevur givið nágreiniligt samtykki. Um fleiri persónar eru á upptøkunum, skulu allir geva samtykki. Samtykki skal vera nágreiniligt og kann tí ikki gevast tigandi. At ein persónur fer inn í ein handil, sum skeltar við yvirvøku við vakmyndatóli, er ikki eitt samtykki til víðarigeving. Samtykki skal annars tulkast í samsvari við dátuverndarlógina.

Fyri tað næsta kunnu upptøkurnar gevast víðari, um hetta er heimilað í lóg. Hetta kann t.d. vera í sambandi við framløguboð (editionspålæg) eftir rættargangslógini ella í sambandi við, at ein eftirlitsmyndugleiki, sum hevur lógarheimild at krevja allar upplýsingar, krevur upptøkurnar útflýggjaðar.

Fyri tað triðja kunnu upptøkurnar gevast til politiið til tess at politiið kann kanna og avdúka lógarbrot.

Útgangsstøðið er, at upptøkur við persónupplýsingum, sum eru gjørdar við tí endamáli at fyribyrgja lógarbrotum, skulu strikast í seinasta lagi 30 dagar eftir upptøkuna. Tað er sjálvsagt

einki til hindurs fyri, at upptøkur verða strikaðar, áðrenn 30 dagar eru farnir. Er dátuábyrgdarin varugur við eitt lógarbrot, skal henda upptøkan víðarigevast til politiið, sum ikki hevur skyldu at strika eftir 30 dagar.

Upptøkur, sum eru gjørdar við tí endamáli at fyribyrgja lógarbrotum, kunnu goymast meira enn 30 dagar, um tað er neyðugt fyri, at dátuábyrgdarin kann viðgera eina ítøkiliga ósemju. Hetta kann t.d. vera í málum um agatiltøk, t.d. burturvísing av starvsfólki.

Um talan er um eina ítøkiliga ósemju og upplýsingarnir harvið kunnu goymast longur, skal dátuábyrgdarin í hesum førum innan 30 dagar kunna tann, sum ósemjan er við, og eftir umbøn geva viðkomandi avrit av upptøkuni. Dátuábyrgdarin skal harumframt syrgja fyri, at upplýsingar um onnur, sum ikki eru viðkomandi fyri ósemjuna, so vítt møguligt verða strikaðar úr upptøkuni.

# 9. Dátuábyrgdari og dátuviðgeri

Yvirvøka við vakmyndatóli fevnir ofta um persónar, og tí verður ofta talan um viðgerð av persónupplýsingum. Við tað at talan er um viðgerð av persónupplýsingum, skal yvirvøkan umframt at fylgja ásetingum í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli, vera í samsvari við dátuverndarlógina. Dátuverndarlógin ásetur krøv til dátuábyrgdaran (og dátuviðgeran)

Tann, sum hevur ábyrgdina av yvirvøkuni, er dátuábyrgdari (hetta kann t.d. vera eigarin ella ein leigari), og skal sostatt fylgja reglunum í dátuverndarlógini um m.a. viðgerðartrygd og meginreglunum um viðgerð av persónupplýsingum.

## 9.1. Viðgerðartrygd

Sambært dátuverndarlógini skal dátuábyrgdarin seta hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk í verk fyri at tryggja og kunna vísa á, at viðgerð er í samsvari við dátuverndarlógina. Í hesum sambandi skal dátuábyrgdarin leggja upp fyri slagi, vavi, samanhangi og endamáli við viðgerðini umframt váðum fyri rættindini hjá skrásetta.

Harumframt skal dátuábyrgdarin seta hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk í verk, bæði tá tólini til viðgerð verða løgd føst, og tá viðgerðin fer fram, sum eru sniðgivin á ein slíkan hátt, at viðgerðin lýkur krøvini í dátuverndarlógini.

Um dátuábyrgdarin nýtir dátuviðgera í sambandi við yvirvøku við vakmyndatóli, skal einans verða nýtt dátuviðgerar, sum veita fullgóða trygd fyri, at hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk verða sett í verk, sum tryggja, at viðgerðin lýkur krøvini í dátuverndarlógini.

Dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu tryggja eitt trygdarstøði, sum hóskar til váðarnar, sum standast av viðgerðini, við at seta í verk hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk.

## 9.2. Heimild og meginreglur fyri viðgerð av persónupplýsingum

Tá dátuábyrgdarin viðgerð persónupplýsingar, skal viðgerðin hava heimild í dátuverndarlógini. Viðgerðin av persónupplýsingum í sambandi við yvirvøku við vakmyndatóli, skal hava heimild sambært § 8, stk. 1, nr. 1-6

Umframt, at viðgerðin skal hava heimild, skulu meginreglurnar í § 7 verða fylgdar.

Sambært meginreglunum í § 7 skulu persónupplýsingar:

- Viðgerast lógliga, rímiliga og á ein gjøgnumskygdan hátt
- Savnast til nágreiniliga tilskilað og heimilað endamál og skulu ikki seinni viðgerast á ein hátt, sum er í ósamsvari við hesi endamál
- Vera nøktandi, viðkomandi og avmarkaðar til tað, sum er neyðugt til tey endamál, sum tær verða viðgjørdar til
- Vera rættar og nøktandi dagførdar
- Goymast soleiðis, at ikki ber til at eyðmerkja tey skrásettu í longri tíðarskeið enn neyðugt við atliti at endamálinum við viðgerðini
- Viðgerast á ein hátt, sum tryggjar nøktandi trygd av persónupplýsingum, undir hesum vernd ímóti óheimilaðari ella ólógligari viðgerð og ímóti missi av tilvild, fyribeining ella skaða, við nýtslu av hóskandi tøkniligum ella bygnaðarligum, herundir fysiskum, tiltøkum.

# 10. Fráboðan til Dátueftirlitið

Sambært § 9, stk. 2 skulu øll vakmyndatól fráboðast Dátueftirlitinum, sum førir eina skrá yvir vakmyndatól.

Talan er um eina fráboðanarskipan og ikki um eina loyvisskipan. Dátueftirlitið kann vegleiða um hesa løgtingslóg og dáturættarligu avbjóðingarnar við yvirvøku o.s.fr. Um eitt fráboðað vakmyndatól greitt er í ósamsvari við løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli, skal Dátueftirlitið gera vart við hetta.

Tá ið vakmyndatól skulu fráboðast Dátueftirltiinum, skal eitt fráboðanarskjal fyllast út. Fráboðanarskjalið er á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum.

Um munandi broytingar verða gjørdar í yvirvøkuni, skal hetta eisini fráboðast Dátueftirlitinumm, sbrt. § 9, stk. 3.

Í § 11, stk. 2 er ein serlig skiftisregla, sum hevur við sær, at vakmyndatól, myndatól og líknandi, sum sambært § 9, stk. 2, 1. pkt. skulu fráboðast Dátueftirlitinum, og sum eru sett upp, áðrenn 1. januar 2021, skulu fráboðast Dátueftirlitinum í seinasta lagi 1. juli 2021.

# 11. Fráboðan til politiið

Tað er Føroya Politi, sum hevur eftirlitið við, um løgtingslóg um vakmyndatól verður hildin. Hetta hevur m.a. við sær, at um ein gerst varugur við, at eitt vakmyndatól er sett upp í ósamsvari við løgtingslógina, skal viðkomandi venda sær til politiið.

Í ivamálum ber til at venda sær til Dátueftirlitið, sum kann kunna um løgtingslógina o.s.fr.

**Vegleiðing**
© 2021

Endurprent við kelduávísing er lóglig.

Givið út:
Føroya Politi, Løgmansskrivstovan og Dátueftirlitið

POLITI

Dátueftirlitið